# Lomvigarnir druknaðu í basshavi


Mynd: Sunva E. Lassen

**Enski bólkurin, Guillemots, var eitt av stóru nøvnunum á G! 2007. Mongu jaligu ummælini av teirra live-framførslum gjørdu sítt til, at teir vóru ovarlaga á mínum lista í ár. Tiltiknir fyri at gera nýggj og óvæntaði ting á pallinum og aldrin hava nakra framførslu, ið er eins, var nakað, sum ljóðaði spennandi og hugvekjandi í mínum oyrum.**

UMMÆLI
*Petur Háberg*
*petur@sosialurin.fo*

Sandurin var ikki meiri enn hálvfullur, tá ið framførslan fór í gongd, beint áðrenn midnátt leygarkvøldið. Men tað forðaði ikki bólkinum í at seta gongd í.

## Hóskandi navn

At navnið Guillemots, ið merkir 'lomvigar', ikki kemur av ongum, var skjótt greitt. Meðan garvilli trumuspælarin og kvinnuligi kontrabassisturin løgdu ein tungan og góðan botn, vóru alskyns óljóð blandað saman í ein vælljóðandi kokkteyl. Saksofonisturin og klarinettspælarin megnaðu at ljóða júst sum illir lomvigar.

Sangarin, Fyfe Dangerfield, ið tók sær av tangentunum og spældi gittar inn í millum, legði sína penu og vælljóðandi rødd omaná. Hann sang ótrúliga vakurt, og var hansara rødd eitt slag av reyðum tráði í skipaða óruddinum. Serliga tá ið hann stóð einsamallur við gittara hoyrdi tú, at hesin maðurin dugdi at syngja. Bæði í sangi og útsjónd minti hann eitt sindur um háttvirda Jeff Buckley, sála.

Illa ber til at seta tónleikin hjá Guillemots í ein ávísan bás. Sambært bólkinum sjálvum, er hetta eisini meiningin. Meðan okkurt lagið koyrdi í skjóttgangandi polkatakt, var okkurt annað reinur poppur. Tó við lomvigaljóðið.

## Bassurin át alt

Vánaligt ljóð hevur øst mangan tónleikara og somuleiðis mangan áhoyrara gjøgnum ár og dag. Ein bólkur kann spæla sína bestu framførslu nakrantíð, men samstundis ljóða ræðuligt í oyrunum á áhoyrararnum, orsaka av vánaligum ljóði. Og hvussu ofta hevur ein áhoyrari ikki fingið eina vánaliga framførslu, tí at tónleikararnir ikki hava havt nóg gott ljóð og ikki hoyrt hvønn annan nóg væl á pallinum?

Sjálvt um ljóðið var sum heild gott á G!, var hetta tiverri ikki galdandi undir framførsluni hjá Guillemots. Ljóðið var vánaligt (ið øllum førum har sum eg stóð), og hetta forðaði mær í at njóta hana til fulnar.

Serliga var tað ógvusliga bassljóðið, ið plágaði meg. Ikki so nógv ljóðið á sjálvum kontrabassinum, men heldur felags bassljóðið út eftir. Tann lági frekvensurin, sum tað kallast á tónleikamáli.

Hetta gjørdi, at øll tey spennandi og nýskapandi elementini, sum skuldu vera so áhugaverd, druknaðu í tí altumfevnandi bassinum. Ótrúliga synd.

Vónandi var hetta bara galdandi fyri meg, ella har sum eg stóð, tí allatíðina hómaði tú tað geniala í tónleikinum, men slapp aldrin ordiliga at njóta tað.

# Syðrugøta ligger í Spanien



**Tað passar so ikki heilt, men Nephew og veðrið fingu okkum at halda tað eina løtu.**

UMMÆLI
*Dánial Hoydal*

Hóast spennandi G! skráin hevði stór nøvn sum Natashu Bedingfield og Guillemots á, var høvuðsnavnið fyri mong danski bólkurin Nephew. Teir spældu og framførdu so væl seinast, teir vóru á G!, at ein stór fjøld var savnað á sandinum hóskvøldið og væntaði sær tað sama.

Hóast konsertin tá var nakað heilt serligt, varð fjøldin heldur ikki hesaferð vónsvikin. Konsertin var einastandandi góð, og Nephew leveraði vøruna. Teir vóru professionellir og dugnaligir. Men samstundis tendraðir frá fyrsta bríksli. Skjótt kókaði fjøldin, og vit sluppu at hoyra øll hittini live, sum hvørt føroyskt mansbarn eftir hondini kennir frá útvarpinum.

Meðan pallurin á sandinum tyktist nakað stórur til onkrar av smærru og/ella óroyndaru bólkunum á G!, so var tað mestsum øvugt við Nephew. Teir vóru allastaðni, skítfullir av orku, útstráling og spæligleði.

Veðrið var eisini einastandandi, so tú hoyrdi fleiri siga eftir framførsluna, at betri verður tað neyvan á G! Í mun til veðrið fingu tey órætt. Men í mun til tónleikin var tað ikki langt frá.

Mynd: Sunva E. Lassen